## VIÐMERKINGAR

# Nýtið tølini frá Gallup konstruktivt?

RÓGVI RÓIN
Sølustjóri



Lurtaði eftir áhugaverda og – fyri meg - viðkomandi prátinum, ið teir báðir Kára'arnir – yngri og eldri, sum teir rópa seg, – høvdu við teir tríggjar Petur Mohr Reinert frá VikuBlaðnum, Inga Samuelsen frá Dimmalætting og Jan Müller frá Sosialinum í morgunsendingini hósmorgunin í síðstu viku. Teir tosaðu serliga um lesaratalið hjá hesum trimum bløðum við støði í kanningum, sum Gallup Føroyar ger og regluliga hevur gjørt.

Eg hevði ongar ambitiónir at blanda meg í hetta kjakið, men sum prátið gjørdist í sendingini, kann eg ikki lata vera við at lata fleiri av útsøgnunum – serliga hjá Jan Muller, blaðstjóra á Sosialinum - fara framvið borðinum ósvaraðar.

**Hví vísa dagbløðini ongantíð til lesaratølini?**

Fyri tað fyrsta er tað alment kent í grannalondum okkara, at dagbløðini við jøvnum millumbilum vísa til lesaratøl, sum t. d. Gallupstovnurin ger. Hetta gera føroysku dagbløðini ikki. Hví kanst tú so spyrja? Eg veit ikki, men út frá kjakinum í morgunsendingin hósmorgunin, eru ábendingarnar týðiligar.

– Tølini geva IKKI tær ábendingarnar, sum dagbløðini vilja hava! Tølini hjá Gallup vísa nevniliga, at VikuBlaðið er tað blaðið, sum flest føroyingar »hyggja« ígjøgnum.

– Onnur orsøk kann vera, at bløðini IKKI hava álit á regluligu lesarakanningunum, sum Gallup ger, har teir spyrja umleið 520 fólk, um tey hava »**hugtígjøgnum seinastu útgávuna av..**«..Dimmalætting, Sosialinum, VikuBlaðnum, SMS blaðnum, Trúboðanum og øllum hinum bløðunum, sum verða givin út.

Í samrøðuni hósmorgunin setti Jan Müller, blaðstjóri á Sosialinum, beinleiðis spurnatekin við trúvirðið á kanningunum hjá Gallup, tí tær verða gjørdar týsdag, og harvið eru til fyrimuns fyri VikuBlaðið, sum kemur út hendan dagin, meðan stóra blaðið hjá Sosialinum, er leygardagsblaðið. Hesin pástandur er beinleiðis skeivur, tí umleið 10 spyrjarar frá Gallup klára ómøguliga at ringja til fleiri enn 520 fólk upp á ein dag/kvøld. Jan og onnur starvsfólk á Sosialinum hava fleiri ferðir áður víst mær á hendan pástand, og havi eg eins og Gallup Føroyar eisini víst teimum á, at kanningarnar verða gjørdar yvir fleiri dagar og ikki bara týsdag.

**Nýtið hagtølini konstruktivt!**

Síðani Gallup Føroyar fór undir at gera sínar spurnakanningar í apríl mánaði í 2002, havi eg óivað starvast í teimum báðum fyritøkunum, sum hava gjørt flest Gallup-kanningar í Føroyum. Hetta eru báðar fyritøkur, sum eftir míni metan eru mest sjónligar og mest málvitaðar á føroyska lýsingamarknaðinum. Í tøttum samstarvi við Gallup Føroyar og seinast eisini við teirra analytikarum, gera vit smærri og størri kanningar og greiningar av tølunum. Veit eisini, at onnur, sum starvast í lýsingarvinnuni, nýta Gallup at gera kanningar fyri seg.

Í sambandi við lesaratølini eru vit serliga áhugað í demo- og geografiska býtinum av lesarunum og hvussu lesaraprofilurin (aldur, kyn, áhugamál, inntøka v. m.) á teimum ávísum miðlunum er, og hetta nýta vit aftur í okkara strategi og planlegging av lýsingarherferðum v. m. Hetta fyri at fáa sum mest burtur úr okkara lýsingakrónum. Vit vilja stutt sagt lýsa har, VIT meta ávirkanina vera størsta.

Tí vil eg siga við Jan, at ístaðin fyri at harta Gallup Føroyar fyri ikki at seta røttu spurningarnar og at siga, at teir samanbera lesaratølini fyri dagbløðini Sosialin og Dimmalætting, við eitt nú tølini fyri VikuBlaðið, Kvinnu, Trúboðan og líknandi bløð, átti Sosialurin heldur at farið í samstarv við Gallup og funnið fram til »røttu« spurningarnar; ALTSO teir spurningarnar, hann og teir á Sosialinum meta vera teir røttu. Í Íslandi verða lesaratølini fyri ókeypis bløðini, Frettablaðið og Blaðið, alment samanborin við dagbløðini DV og Morgunblaðið. Hví skal hetta verða trupulleiki her hjá okkum?

Hvørki vit - ella nøkur onnur fyritøka ella stovnur – nýtir Gallup-kanningar at greiða frá nøkrum, vit vita frammanundan. Hinvegin hyggja vit kritiskt eftir kanningunum og nýta tær til at **STAÐFESTA**. Meta vit, at aðalsetningurin í ávísari kanning vísir, at vit ikki røkka málsetningunum, tillaga vit møguliga okkara strategi eftir hesum

Tí kanst tú spyrja, um dagbløðini ikki tora ella tola at fáa ta STAÐFESTING, at flest føroyingar »hyggja« í VikuBlaðið! Heldur áttu tit, sum varða av, at nýtt hesi og onnur tøl og kanningar frá Gallup konstruktivt í tykkara menning av bløðunum og tykkara virksemi annars.

Vil at enda bera dagbløðunum báðum, Dimmalætting og Sosialinum, rós fyri, at tey royna at betra seg og tillaga seg øktu kappingina og harvið gerast enn meira attraktiv hjá okkum lýsarum at lýsa í. Tøkk til VikuBlaðið fyri at hava verið við til at økja um útboðið av lýsingarmiðlum, og tøkk til Gallup Føroyar fyri at hava tikið stig til at bjóða tænastur fram, sum – um rætt atborið – kunnu hjálpa føroyskum fyritøkum at menna seg og leggja ætlanir.

*rogvi@kall.fo*

# Vínnulívsins listarverk

JÓGVAN VIÐ KELDU
Løgtingsmaður



**– Tøkk til Leiv Hansen, fjølmiðlamann og listamenninar Oddfríð Gergersen og Aksel Hansen, skrivar Jógvan við Keldu**

Seinastu sunnukvøldini eru tvinnar sendingar farnar av stáplinum av trimum, sum fjølmiðlamaðurin Leivur Hansen, hevur loyst úr lagdi og kallar »Slóðarar«.

Hesi áhugaverdu søgubrot eigur hann tøkk fyri. Hann gevur okkum við hesum eina fatan av vinnulívsins veruleikum við upp- og niðurgongdum, framgongd og bakkøstum, við innløgum og tá neyðugt var at seta ognir og alt ein átti í veð, so væl sum tá ljósir dagar og hóttafall komu á leiðina.

Meðan eg sat og hugdi, sá eg fyri mær ymisku listaverkini, har vit mangan skilja so lítið, tað veri seg í tónleiki, málningaverki ella í vinnuni.

Allir træðrir, litir, tónasamansetingar og avgerðir, teir dimmu, ljósu eins og ymisklittu sum trilvandi koma úr dýpinum, fara spælandi upp móti flatuni og út móti havsbrúnni. Allir hesir samfeldir skapa fullkomna mynd.

**Hægra eindin**

Hvør skilir til fulnar eitt vinnulívsins listarverk uttan hann, sum farin er ígjøgnum tað frá byrjan til enda, bert tann sum av og á var um at geva upp, men tók aftur í aftur, og bardi seg uppundan aftur. Hugsaði bæði um seg sjálvan og tey hann breyðføddi.

Peningaupphæddir, kenslur, fagnaður um framgongd, øvund, sosialistiskur hugburður, droymarí og »betrivitan«, alt gongur vanliga upp í hægri eind, bæði hjá teimum sum skaptu og hjá hinum sum við sjálvsnøgd sótu og funnust at.

Eina hjartans tøkk eigur Leivur Hansen, fjølmiðlamaður fyri hesar sendingar, nú hann sjálvur saman við stjóranum á SEV fær tápuliga og óverduga viðferð og er úti í ódnarveðri.

Sum Bjarti Mohr tók til í SVF, so var SEV skúta, sum sigldi vandasjógv, tá Klæmint Weihe fór á brúnna, meðan hon ídag einki er minni enn stoltleiki við tryggum veitingum út í hvønn krók í Føroyum og frá einum eginpeningshalli til ídag einum eginpeningi upp á 300 mió. krónur.

Hetta kanska hoyrir ikki upp í greinina – og tó!

Lítið er at siga til, at orðatakið millum danir veruliga í løtuni gongur sína sigursgongd: »Nej, de færinger«!

Men Leivur, tøkk fyri at tú hevur víst okkum á ein lítlan men virðismiklan part av føroyska vinnulívsins listaverki og tøkk til listamenninar báðar Oddfríð Gregersen og Aksel Hansen.

# Nú hava danir klippikortskipanina, so nú er lag á manni!

HERI SIMONSEN



**– Lat tað vera eina góða byrjan at innføra klippikortsskipanina. Tað snýr seg fyrst um upplæring og motivasjón, og ikki um straff, skrivar Heri Simonsen**

Vit vóru nøkur sum um aldarskiftið vístu á, at tað vóru fleiri lond her vestanfyri, sum høvdu eina klippukortsskipan innan ferðsluøkið, m. a. Ísland. Víst var á tann góða moralin við einari klippukortsskipan har akfarsførarar í einum 3-ára tíðarskeiði hava møguleikan at bøta upp á skeivar gerðir í ferðsluni. Ein kann blíva nullstillaður í klippikortsskipanini/stigaskipanini eftir trimum árum, um ein skikkar sær væl í ferðsluni í hesum 3-ára skeiðnum! Men m. a. nógvir tingmenn sóu seg illar inn á hesa »poengskipan« og hesi »bonusklippini«, sum onkur núverandi floksformaður málbar seg á sinni. Tað kom eisini undan kavi, at Danmark ikki hevði hesa klippikortsskipanina, og tí var sjálvsagt, at vit í Føroyum ikki áttu at hava hana heldur. Tað var einasta poengið teir høvdu!

Men danir gera tað, sum vit føroyingar ikki gera! Teir hyggja nevnliga eftir, hvussu gjørt verður í øðrum londum enn bara í Danmark. Og danir hava m. a. hugt eftir, hvussu teir gera í Íslandi! Og nú hava danir sjálvir innført eina klippikortsskipan, sum eru ógvuliga lík tí íslendsku. Og sum formaðurin í »Rådet For Større Færdselssikkerhed« segði við eitt føroyskt tíðindablað í síðstu viku: »Med stor succés«. Og nú tá danir hava hesa klippikortsskipan skuldi væl verið møguleiki fyri, at vit fáa eina líknandi skipan lógarfesta í Føroyum. Annars er Danmark undangonguland tá tað kemur til súkklubreytir. Danmark er óiva besta súkkluland í heiminum. Haraftrat hava danir gott útsýni við nærum allar krossvegir. Har hava føroyingar ikki fylgt dønum serliga langt, fyri ikki at siga: als ikki! Men lat tað vera eina góða byrjan at innføra klippikortsskipanina. Sofus Hansen, fólksins maður í ferðslumálum vísti so staðiliga á í Sjónvarpstjakinum, at tað snýr seg fyrst um upplæring og motivasjón, og ikki um straff! Og rætt hevur hann!

*heri.simonsen@postur.fo*

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.
Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni. Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.





